MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingsins Fíggjarnevnd
Løgtingsskrivstovan
Tinghúsvegur
100 Tórshavn

Dagfesting: 2. juli 2008
Tygara ref.:
Máltal: 70-22101/080977 -/1

**Fíggjarnevndarskjal**

**a. Inngangur**
Landsstýriskvinnan í mentamálum søkir við hesum Løgtingsins Fíggjarnevnd um eyka-játtan á 3 mió. kr. til høvuðskontu 7.23.2.02. Sernámsdepilin.

**b. Málsfrágreiðing**

**Játtan til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum**

| | 2006/07 | 2007/08* | 2008/09 | Munur 07-08 | Fí.skjal |
|---|---|---|---|---|---|
| Játtan, mió.kr *(FL06,FL07,FL08)* | 22 | 28,9 | **29,9** | 3% | **34,9** |
| Næmingar, tal | 409 | 398 | 465 | 17% | 465 |
| Ynskir, tímar pr. viku | 3763 | 4117 | 4918 | 19% | 4918 |
| Játtan, tímar pr. viku | 1700 | 2408 | **2077** | -14% | **2852** |
| Játtan í mun til ynskir, % | **45** | **58** | 42 | -28% | **58** |

* Pr. 1. januar 2007 varð ábyrgdin av stuðlum til fólkaskúlanæmingar flutt frá AHR til MMR.
Viðm. tímar eru umroknaðir til læraratímar

Í 2008/09 økist talið av næmingum, ið hava tørv á tímum til stuðlar og serligan tørv við 17%, og ynskini frá skúlunum um játtan til tímar øktust við 19 %. Ynskini frá skúlunum til serligan tørv skúlaárið 2007/08 vóru 4.117 tímar pr. viku, tá vóru játtaðir 2.408 tímar ella uml. 58 % av ynskinum. Ynskini frá skúlunum komandi skúlaár eru 4.918 tímar pr. viku og játtanin røkkur bert til 2.077 tímar ella uml. 42 % í mun til ynskini.

Við verandi játtan verður neyðugt at lækka tímatalið eftir summarfrítíðina við 14 % samanborið við seinasta skúlaár. Orsøkin er, at skúlaárið 2007/08 – og harvið eisini 1. hálvár 2008 - hevur tímatalið verið so mikið høgt, at verandi játtan ikki heldur til, at hetta tímatalið heldur áfram árið út. Hetta skyldast m.a. at tað í tíðarskeiðnum august-desember 2007, vóru nýttar nærum 5 mió. kr. eyka til tímar til serligan tørv. Hetta gav rúm fyri at lata fleiri tímar til skúlarnar í hesum tíðarskeiði (uml. 1 mió. kr. eyka pr. mánaða), og tá skúlaárið gongur til og við 1. august árið eftir, hevur tímatalið verið á sama høga støði 1. hálvár 2008. Tá tær 5 mió. kr. ikki eru øktar í 2008 samsvarandi at hesar í 2008 verða nýttar eitt heilt ár, røkkur verandi játtan ikki.
Hetta eru upplýsingar, ið tíverri ikki eru komnar landsstýriskvinnuni í hendi fyrr enn nú.

Skulu skúlarnir eisini eftir summarfrítíðina og harvið í skúlaárinum 2008/09 fáa sama tímatal pr. viku játtað í mun til ynskir/tørv, verður neyðugt við eykajáttan til 775 tímar

pr. viku (sí talvu omanfyri), ið svarar til 5 mió. kr. tað í eftir er av 2008 (324 kr. pr. tíma í miðal, í 20 vikur).

Á fíggjarlógini fyri 2008 er m.a. peningur settar av til stovnsetan av NSR-tænastu í Tórshavn. Av tí, at tað hevur tikið longur tíð enn væntað, at fáa gongd í virksemið í hesi NSR-tænastu, metir Sernámsdepilin, at um 2 mió. kr. kunnu flytast frá undirkontu 7.23.2.02.22 til 7.23.2.02.21.

Samanlagt verður tí biðið um, at fáa eina meirjáttan til tímar til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum, á undirkontu 7.23.2.02.21 á 3 mió. kr.

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | 2008<br>J | **2008**<br>**EYJ** | 2008<br>J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 54.285 | 3.000 | 57.285 |
| Útreiðslur | 54.885 | 3.000 | 57.885 |
| Inntøkur | 600 | - | 600 |
| **20. Sernámsdepilin** | | | |
| Nettoútreiðsla | 7.720 | - | 7.720 |
| **Útreiðslur** | **7.720** | - | **7.720** |
| 11. Lønir v.m. | 7.220 | - | 7.220 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 450 | - | 450 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 50 | - | 50 |
| **21. Sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum** | | | |
| Nettoútreiðsla | 29.947 | 5.000 | 34.947 |
| **Útreiðslur** | **29.947** | 5.000 | **34.947** |
| 11. Lønir v.m. | 29.842 | 5.000 | 34.842 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 105 | - | 105 |
| **22. Sernámsfrøðiligar tænastueindir** | | | |
| Nettoútreiðsla | 4.312 | -2.000 | 2.312 |
| **Útreiðslur** | **4.312** | **-2.000** | **2.312** |
| 11. Lønir v.m. | 4.312 | -2.000 | 2.312 |


Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

MENTAMÁLARÁÐIÐ

**23. Skúlin á Trøðni**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 12.306 | - | 12.306 |
| **Útreiðslur** | **12.906** | - | **12.906** |
| 11. Lønir v.m. | 11833 | - | 11.833 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.003 | - | 1.003 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 26 | - | 26 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 24 | - | 24 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 20 | - | 20 |
| **Inntøkur** | **600** | - | **600** |
| *77. Flyting frá kommunum* | *600* | - | *600* |

## c. Grundgeving fyri framløgu

Landsstýriskvinnan metir, at málið hevur stóran samfelagsligan týdning og skund.
Málið hevur stóra ávirkan á nógvar næmingar, foreldur, og skúlar – og tað verður ikki mett ráðiligt at bíða við hesi eykajáttan, til Løgtingið kemur saman. Orsøkin er, at skúlarnir byrja aftur fyrst í august, og mugu tí, í góðari tíð áðrenn hetta, fáa boð um endaligt tal av tímum, soleiðis at starvsfólk kunnu setast og virksemið kann leggjast til rættis samsvarandi hesum áðrenn skúlaárið byrjar.

Talan er í fyrsta umfari um átroðkandi tørv, ið má loysast her og nú. Men landsstýriskvinnan ásannar at tørvur er á, at skipa hetta við tímum til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum betri framyvir. M.a. er neyðugt við samskipan millum skúlar í somu kommunu, størri samsvari millum tørv og játtaðar tímar, eins og dygdin av stuðlum skal eftirmetast. Eisini er neyðugt at samskipa stuðlar í dagstovnum og fólkaskúlum betur. Málið sum heild verður tikið upp í næstum.

## d. Uppskotið

Vísandi til omanfyri standandi verður søkt um eykajáttan soleiðis, at á eykafíggjarlógini fyri 2008 verður tikið við:

## § 7 Útbúgving og gransking

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **7.23.2. Fólkaskúlin v.m.** | | | |
| 02. Sernámsdepilin (Rakstrarj.) | J | 54.285 | - |
| | **EYJ** | **3.000** | - |

MENTAMÁLARÁÐIÐ

**e. Tilsøgn frá Fíggjarmálaráðnum**
Fíggjarmálaráðið hevur givið tilsøgn um, at umsóknin verður send Løgtingsins Fíggjarnevnd, av tí, at málið hevur skund.

Váttað:

Karsten Hansen
*landsstýrismaður*

Atli Suni Leo
*ráðgevi*

Kristina Háfoss
*landsstýriskvinna*

Petur Petersen
*aðalstjóri*


Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo